

*Sámal Petur Petersen úr Fuglafirði var ein stovnari av reiðarafelagnum*



*J.C. Djurhuus, Faktorin, umboðaði Norðoyggjar í fyrstu nevndini í reiðarafelagnum. Hansara virksemi fer seinni at verða lýst í røðini Hendur ið Sleptu*

Fiskimannafelag blev stiftet. Modstand mødte det, Haan og Spot maatte det døje, men det blev stiftet og det var Hovedsagen. Den Organisation, som burde have virket i Slutningen af forrige Aarhundrede, blev først til Virkelighed i 1911. Og anderledes, ret beset, kunde det vel ikke være! Et Folk, som har haft usle Skoler, hvor Almensansen har været sløvet, hvor kun de rige og Embedsmændene har styret, der skal man ikke forvente at finde den tanke at være fremherskende, at det gælder om at staa sammen. Men saa fortvivlet var Situationen bleven, at den Gang Fiskere i Gøte sammen med mig udsendte indbydelse til at danne en Forening af Fiskere, viste det sig, at store Dele af Fiskere ikke var med paa Tanken. Mon nogen Fisker nu bagefter fortryder, at F.F. har eksisteret?

Ret beset, hvad har F.F. haft at betyde for Skibsfiskeren? Det har først lært ham at kende Sammenslutningens Magt og lært ham at forstaa, at man har ikke alene Pligter overfor sig selv, men ogsaa overfor sin Arbejdskammerat. Det har lært ham, at hvad der saa ganske haabløst ud for den enkelte, da han stod inde paa Paamønstringskontoret, at faa Kontrakten forbedret, det lod sig gøre, da Fiskeren stod organiseret og havde valgt sin Bestyrelse og Formand. Overfor den organiserede Fisker kunde man ikke hjælpe sig med en lunefuld Bemærkning og et haanligt Blik. Her stod man overfor en Magt, som ikke saadan uden videre lod sig afvise. Og denne Magt, Sammenslutningens Magt, har været Fiskeren til stor økonomisk Nytte. Mon ikke mangen en Fisker har stillet sig det Spørgsmaal: "Hvorledes vilde Kontrakten have været, hvis F.F. ikke havde eksisteret?" Og det kan være ganske interessant at anstille Betragtninger desangaaende og det særligt af den, som aarevis har haft med de Spørgsmaal at gøre, og som vidende om, at Rederiforeningen har haft Forslag fremme om, at lade Fiskeren fiske for 20 pct. af Fangsten. Hvorledes det vilde have set ud i mangt et Fiskerhjem i Krigsaarene, hvis F.F. ikke havde varetaget hans Interesser, kan man nok gøre sig en Forestilling om, - thi der er ingenlunde blot Tusinder af Kroner, men Millioner af Kroner Fiskeren har vundet ved sin Sammenslutning.

## Samráðingar og verkfall

Fyrst í januar 1913 var vandi fyri verkfalli, men semja gjørdist kortini, og nýggi sáttmálin var galdandi í trý ár.

Á heysti 1917 vóru aftur samráðingar við fiskimannafelagið. Men nú var nógv broytt, tí hetta var undir fyrra heimsbardaga, tá umstøðurnar vóru sera truplar.

Reiðarafelagið boðaði frá, at tað ikki kundi ganga undir sama sáttmála. Teirra uppskot var, at manningin skuldi luttaka í útreiðslunum av salti og fiskireiðskapi. Hetta uppskot sendir FF út til limirnar, og teir siga so korta nei. Føroya Reiðarafelag royndi so við uppskoti um lækking av býtisprosentinum úr einum triðingi niður í 25%. Hetta uppskot fór út til atkvøðugreiðslu millum fiskimenn, sum aftur vrakaðu eini og hvørji lækking í býtisprosentinum.

Komið var út í januar 1918 og støðan var fastløst. Tá verður ein nýggj samráðingarroynd gjørd.

Hetta endaði við óbroyttum prosenti til fiskimenn. Men afturfyri máttu fiskimenn góðkenna ein fastan prís fyri fiskin, sum var 50 oy/kg fyri stóran fisk og minni fyri tann smærra.

Hetta merkti, at tann "reini triðingurin" var bjargaður, men frábýtisrætturin varð niðurlagdur fyri eitt ár.

Fiskimenn norðanfjørðs góðkendu hesa semju, men tað gjørdu fiskimenn í Suðuroy ikki. Teir kallaðu hendan fasta prísin fyri "trælabandið", og fóru við stjórnarliminum í Suðuroy Rasmus Siirsjold á odda í verkfall.

Tískil vórðu suðuroyaskipini løgd. Hetta var jú ein stórur partur av flotanum.

Tá tók Rasmus Siirsjold til tey sjáldsomu ráð at senda boð til amtmannin og biðja hann um at koma til steðar at greiða fløkjuna.

## Seinasta avrikið hjá Rytter

Amtmaðurin var Svenning Rytter, sum annars hevur fingið ringt orð á sær í Føroyum. Men hann var longu tá farin at senda sjóvinnumál til feløgini til ummælis. Hetta sigur, at hann eisini hevur havt dygdir og verið framskygdur.

Rytter vendir sær til formann FFs S. P. úr Konoy, og hetta endar við, at Beskytteren 7. mars 1918 stevnir til Suðuroyar við stjórn FFs, stjórn skiparafelagsins, formaður tá var Grias Johannesen, og reiðarum norðanfjørðs umborð.

Samráðingarnar byrjaðu við, at hvør parturin hevði fund fyri seg, seinni komu øll á ein felagsfund.

Her var nógv tosað aftur og fram. Umboð fyri FF fóru útum at tosa við fiskimenn, sum nógvir vóru av, 300 í tali, í bygdini. Fiskimenn vildu hava enda á verkfallinum, men fastan prís vildu teir ikki vita av.

Nú byrjaðu samráðingar rættuliga við amtmanninum sum semingsmanni. Í umbúna á ríkisdegi var tá eitt uppskot um at lata studning til at minka um tann ovurstóra saltprísin.

Hetta kom eisini inn í samráðingarnar. Sagt varð amtmanninum til rós, at hann legði sær eina við at koma á mál við einum sáttmála, og hann var loyalur móti øllum pørtum.

Hetta endaði við eini avtalu í fýra punktum:

1. Frítt val millum sáttmálan frá 27 januar við 1/3 til mannngina við føstum prísi ella 27% av veiðuni við frábýtisrætti og fríum sølurætti.

2. Saltstudningurin (um hann kemur) fer til fiskimenninar.

3. Gevur skipið undirskot verður saltstudningurin býttur millum partarnar.

4. Ein sáttmálanevnd verður sett at avgera ivamálini.

Ein útrokning vísti, at fiskimenn máttu fáa 62 oyru fyri kg av saltfiski, um teir skuldu standa seg við at taka 27% heldur enn 33 1/3% og fastan prís.



*Fyrsti mótpartur hjá reiðarafelagnum var Símun Pauli úr Konoy*



*Valdemar Lützen riggaði væl sum semingsmaður í 1919, hóast hann sjálvur var arbeiðsgevari*

Hóast tað ikki sá gott út fyri saltfiskaprísinum tá, valdu allir fiskimenn tey 27%. Hetta loysti seg eisini, tí prísurin fyri árið gjørdist 72 oy/kg.

Umrødda saltlóg kom ongantíð í gildi, men gjørdi tó sína nyttu í júst hesi støðuni at mýkja partarnar.

Beint aftaná løgdu amtmaðurin, fútin og sorinskrivarin frá sær sum mótmæli móti hansara stuðul til Edvard Mitens á fólkatingsvalinum, sum var um hesa tíðina.

## Reiðari semingsmaður

Hetta var fyrsta stóra verkfallið millum fiskimannafelagið og reiðarafelagið. Í fyrsta umfari hevði úrslitið verið positivt. Men stóri trupulleikin var fyri fiskimenn, at teirra partur var farin frá einum triðingi niður í 27%. Tað kundi vera tungt at fáa hetta upp aftur.

Tað vísti seg eisini. Tá samráðst var um sáttmálan á heysti 1918 um sáttmálan fyri 1919 vildu reiðarar ikki hoyra talan um annan sáttmála enn tann við 27%, meðan fiskimenn tvíhildu um tann triðing, sum hevði verið.

Aftaná nýggjár slakaðu reiðarar